## Tøkk

Øllum tykkum, ið gjørdu mær 60 ára føðingardagin ógloymandi, takki eg hjartaliga. Harrin signi tykkum.

*Kærastu heilsanir*
**Beinta**





Eitt rend til Reykjavíkar gevur møguleikar fyri eini ørgrynnu av øðrvísi upplivingum. Lítli og hugnaligi býurin við altjóða dámi er kendur fyri sínar matstovur, kaféir og ríka mentanarlív.
Á Broadway kanst tú njóta ein góðan døgurða afturvið rimmar Rolling Stones undirhaldi. Tú kanst eisini vitja gitnu víkingaveitsluna á Fjørukrónni í Hafnafirði. Og um dagin eru Bláa Lónið ella Geysir freistandi ferðamál, sum rista seg í minnið.


Geysir


Víkingaveitsla


Rolling Stones Show
á Broadway


Bláa Lón



**"Room with a view"**
**mitt á keypsgøtuni í Reykjavík**
**kr. 3.266**
**Fyri hvønn í dupultkamari**
v/ferðaavgjøldum men uttan morgunmat.
Eykagjald fyri einakamar kr. 940.-

**Hotel Barón Apartments**
**tætt við keypsgøtuna í Reykjavík**
**kr. 2.659.-**
**Fyri hvønn í "Studio"**
v/ferðaavgjøldum ,uttan morgunmat.
Eykað fyri einakamar kr. 895.-
**kr. 2.835.-**
**Fyri hvønn í 2-rúms íbúð**
v/ferðaavgjøldum, uttan morgunmat.

**Hotel Frón**
**við keypsgøtuna í Reykjavík**
**kr. 3.060.-**
**Fyri hvønn í "Studio"**
v/ferðaavgjøldum, uttan morgunmat.
Eykað fyri einakamar kr. 1295.-
**kr. 3.247.-**
**Fyri hvønn í 2-rúms íbúð**
v/ferðaavgjøldum, uttan morgunmat.

**Fjørukráin**
**í Hafnarfirði**
**kr. 2.610.-**
**Fyri hvønn í dupultkamari**
v/ferðaavgjøldum og morgunmati.
Eykað fyri einakamar kr. 300.-

**Sjómansheimið ØRKIN**
**í Reykjavík**
**kr. 2.726.-**
**Fyri hvønn í dupultkamari**
v/ferðaavgjøldum og morgunmati.
Eykað fyri einakamar kr. 300.-

SANSIR 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo


# Nýggj ruta til Hetlands

**Smyril Line tekur nú Hetland upp í farmarutuna millum Tórshavn og Hanstholm. Fyrsta fráferðin úr Føroyum verður í morgin**



FARMASIGLING

Í annaðkvøld fer Clare fyrsta túrin til Hetlands við farmi fyri Smyril Line. Rutan, sum byrjar nú, fer at vara fram til summarsiglingin byrjar aftur komandi ár.

Smyril Line sigur í tíðindaskrivi, at farið verður undir nýggja farmarutu um vikuskiftið. Talan er í grundini um verandi rutu, sum verður bygd út við einari destinatióna afturat. Tað er Lerwick í Hetlandi, har farmaskipið Clare fer at leggja at á veg til og úr Hanstholm.

Ferðaætlanin verður tann, at farið verður úr Tórshavn hósmorgun klokkan 01.00, og komið verður til Lervick klokkan 15.00 seinnapartin hósdagin. Farið verður víðari til Hansholm tveir tímar seinni, klokkan 17.00.

Clare verður eftir ferðaætlanini í Hanstholm kl. 18.00 fríggjakvøld og siglir aftur haðani leygarmorgunin klokkan 01.00.

Sunnumorgun klokkan 06.00 verður hon aftur í Lerwick á veg til Føroya. Hon steðgar ein tíma í Lerwick og siglir aftur klokkan 07.00.

Clare verður aftir í Tórshavn mánamorgun klokkan 04.00, har hon so verður liggjandi, til ferðin byrjar aftur hósmorgunin klokkan 01.00, sigur Smyril Line í tíðindskrivinum.

Tó verður ikki siglt 27.12.01 úr Tórshavn og 29.12.01 úr Hanstholm.

Um sjálvt skipið sigur Smyril Line, at M/S "Clare" lastar 50 stk. 15 m trailarar + 80 persónbilar, siglir 16 sm/t og tekur 12 ferðafólk í 6 tvey-koyggjukømurum við bað og WC.

**ej**

# Klovnar í Lognbrá

Leygardagin fara teir báðir klovnarnir Bobo og Fjotti at undirhalda í Klaksvík. Teir fara á pallin í Lognbrá leygardagin kl. 17.00, og tá fáa børnini ivaleyst okkurt at flenna eftir.

Bilstevna er í KÍ-høllini um vikuskiftið, og tað er í hesum sambandi, at klovnarnir fara at spæla klovn í Lognbrá.

Atgongumerkini, sum kosta 40 krónur, kunu eisini brúkast til sjálva bilstevnuna, og tí kunnu foreldur lata børnini fara til klovnarnar, meðan tey sjálvi kunnu fara hyggja eftir bilum.



*Fjotti og Bobo fara at spæla klovn í Klaksvík um vikuskifið*

†

Kunngjørt verður, at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hilmar F. Jacobsen**

andaðist týskvøldið 6.11. á Eldrasambýlinum í Vági, 88 ára gamal. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 12.30 úr Vágs kirkju.

*Familjunnar vegna*

**Henny, Anny, Birgith og Malan**

Tey, ið vilja minnast Hilmar, kunnu lata eina gávu til Eldasambýlið í Vági, konto í Suðuroyar Sparikassa

†

Okkara elskaði maður, sonur, pápi, verfaðir, abbi, langabbi og beiggi

**Edvin Poulsen**
**koyrilærari, Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 6. november, 70 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Martha**



# Tveir løgmenn stilla upp



*Gott lag var á oddamonnunum í Fólkaflokkinum, tá teir kunngjørdu valevnislistan á Gamla Apotekinum hósdagin. Løgmaður stillar sjálvur upp til valið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Líkt er til at Fólkaflokkurin fer at glímast við Tjóðveldisflokkin um annað fólktingsumboðið, sum verður valt 20. november, meðan andstøðuflokkarnir fara at berjast um hitt. Fólkaflokkurin kunngjørdi sín lista hósdagin, og teir hava boðað frá einum hóvligum politikki á sjálvstýrisleið. Bæði Anfinn Kallsberg og Jógvan Sundstein stilla upp**

FÓLKATINGSVAL
*Stefan í Skorin*

Fólkaflokkurin hevur løtt kanónirnar til fólkatingsvalið. Valevnislistin varð kunngjørdur hósdagin á Gamla Apoteki.

Formaðurin Óli Breckmann, ið hevur havt sæti á Fólkatingi síðan 1984, legði valuppleggið hjá flokkinum fyri fjølmiðlarnar. Hann legði dent á, at Fólkaflokkurin fór at leggja seg eftir at føra hóvligan politikk í sambandi við sjálvstýristilgongdina, ið byggir á føroyskt sjálvstýri við skili. Hann setti hetta upp ímóti politikki Tjóðveldisfloksins, ið søkir samanbrestir við donsku stjórnina. Hann legði afturat, at tað er umráðandi at hava góð viðurskifti við Danmark.

Eftir at Tjóðveldisflokkurin legði sítt valupplegg fram týsdagin kennir Fólkaflokkurin seg hóttan av samgongufelaganum. Óli Breckmann vildi vera við, at Tjóðveldisflokkurin fer eftir umboðnum hjá Fólkaflokkinum, og tí væntar hann, at stríðið fer at standa millum hesar báðar flokkar um tað eina umboðið, meðan Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fóru at berjast um hitt.

Tveir av hinum flokkunum hava sagt, at teir fara at halda seg uttanfyri danskan innanríkispolitikk, men Fólkaflokkurin fer framhaldandi at halda seg til tann borgarliga vongin í Fólkatinginum.

Fólkafloksmenn sláa fast, at tað ber ikki til at halda seg uttanfyri danskan politikk, um tú verður valdur inn á Fólkating. Tí kunnu Javnaðar- og Tjóðveldisflokkurin ikki boða frá, at teir fara at halda seg uttanfyri.

Í valupplegginum fer Fólkaflokkurin leggja seg eftir at umboða tann breiða skaran av føroyingum, ið eru sjálvstýrissinnaðir og liberalir í hugsunarhátti.

Óli Breckmann legði dent á, at so leingi vit eru í felagsskapi við Danmark er tað umráðandi, at grannarnir fáa eina borgarliga stjórn.

### Løgmaður stillar upp

Anfinn Kallsberg, ið hevur verið løgmaður síðan 1998, hevur valt at stilla upp til Fólkatingið, hóast hann ikki hevur ætlanir um at taka hetta sætið, meðan hann er løgmaður.

Hann segði, at hetta valið hevur alstóran týdning fyri støðu Føroya, nú ætlanir eru um at gera Føroyar meira sjálvbjargnar búskaparliga og politiskt. Umboðið skal kunna gera seg galdandi í donskum politikki og soleiðis vinna føroyingum nøkur rættindi á sjálvstýrisleið. Hetta skal ikki gerast við hørðum útmeldingum.

Hann heldur, at tað er umráðandi, at Fólkaflokkurin fær ein høvuðsleiklut og sleppur at standa á odda í føroysku umboðanini á Fólkatingi.

Fólkaflokkurin hevur gravað fyrrverandi løgmann Jógvan Sundstein framaftur úr gloymskuni, og hann skal vinna flokkinum nakrar atkvøður, ið skulu tryggja flokkinum sæti á Fólkatingi, har flokkurin hevur havt umboð í fleiri valskeið.

# Valevni hjá Fólkaflokkinum

Óli Breckmann, Tórshavn
Bergur Bærentsen, Tvøroyri
Bjarni Djurholm, Tórshavn
Deirdre Hansen, Glyvrar
Jákup Suni Joensen, Signabøur
Kjartan I. Joensen, Leirvík
Anfinn Kallsberg, Viðareiði
Jógvan við Keldu, Klaksvík
Jógvan á Lakjuni, Fuglafjørður
Leila á Lofti, Argir
Jørgen Niclasen, Sørvágur
Jóanis Nielsen, Sandavágur
Ingi Olsen, Vestmanna
Jákup Olsen, Vágur
Rúna Sivertsen, Klaksvík
Jógvan Sundstein, Tórshavn
Ingimar Tór Thomsen, Skopun
Eyðun Viderø, Sandur


**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

FARPACK
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
**www.farpack.com**




**Hús titt í sólini**

Hús í Spanien og Florida til sølu.
Vit hava ymisk hús á umleið 15 støðum í Spanien og Florida
Kunnu fíggja upp til 60% af keypusvirðinum.
**Kunning verður á Hotel Hafnia leygar- og sunnudaginn 10 og 11 november Frá kl. 14-18.**
Øll eru velkomin.









www.buysunhouses.com